

Vertinnurnar í íslendska grand prixinum Ragnhild Steinunn Jónsdóttir og Eva María Jónsdóttir.





Vinnarin í íslendska grand prixinum Hera Bjørk.

Donsku vertirnir Felix Smith og Julie Berthelsen.

# Kjólarnir sum stjólu myndina



DESIGN
**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Sorry Jógvan og Jens Marni! Tit vóru flottir, men tað vóru also vertirnir, sum stjólu Grand Prix-myndina leygarkvøldið. Í Danmark var tað vertinnan Julie Berthelsen, og í Íslandi vóru tað tær báðar Ragnhild Steinunn og Eva María Jónsdóttir.

Seinasta leygarkvøld sótu nokk óvanliga nógv fólk framman fyri sjónvarpsskíggjanum. Fyrst var danska Melodi Grand Prix á skránni, og nakrar tímar seinni var íslendska. Bæði við føroyskum luttakarum.

Í Danmark vóru tað tey bæði Felix Smith og Julie Berthelsen, sum leiddu sendingina. Julie við sloktari frisúru, sum fekk sína frágreiðing, tá hon og Felix fingu sær eitt bað mitt undir sending. Kjólin hjá henni minti mest um ein dalmatinarahund, og longdist ein eftir, at hon skifti til okkurt litríkt, ið passaði betur til hennara litir.

## Fyrrverandi miss Ísland

Annað var, tá tær íslendsku vertirnir komu á skíggjan. Víst var íslendska sendingin í so keðilig, men tær báðar Ragnhild Steinunn og Eva María Jónsdóttir við vøkrum svørtum og gráum kjólum vóru so avbera vakrar, so tað bar ikki til at sløkkja.

Ragnhild Steinunn er vælkendur vertur í íslendskum sjónvarpi og fyrrverandi miss Ísland.

– Kjólarnir eru designaðir av íslenska sniðgevanum Biritu Bjørnsdóttir. Hon hevur gjørt næstan allar kjólar og draktir, eg eri í, tá eg eri á skíggjanum, sigur Ragnhild Steinunn.



*Birita Bjørnsdóttir er sniðgevin handan teir flottu íslendsku kjólarnar.*

Birita Bjørnsdóttir hevur egna merkið Júniform og hevur handil miðskeiðis í Reykjavík. Hon er kend fyri at gera sermerkt pløgg, har onki er líka.

– Eg elski hennara klæði, hon er so dugnalig, sigur Ragnhild Steinunn Jónsdóttir.

Birita Bjørnsdóttir hevði eisini gjørt kjólan sum vinnarin Hera Bjørk var í.

# Við kaldan dreym

KLUMMA
**Eirikur í Jákupsstovu**
eij@sosialurin.fo

Einaferð vaknaði ein politikari í Sundalagnum við kaldan dreym. Flokkurin hjá honum sá út til at blíva rættiliga stórur til komandi valið, men eftir øllum at døma fóru persónligu atkvøðurnar at verða ov fáar.

Her var bara eitt at gera: Vallógin mátti broytast, so fólkini hinumegin brúnna eisini kundu velja seg.

Hetta fekk politikarin ígjøgnum. Nógv vóru glað, tí nú bar til hjá útróðrarmonnum í Sumba at velja kunoyingar.

So fantastisk var nýggja skipanin, at hvør kúllur ella gella, sum nú einaferð valdi at stilla upp í Havn, kom inn.

Úrslitið bleiv, at øll hini, máttu gera enn meira burturúr tunnilsdreymum og so framvegis. Hetta bleiv hjá øllum, sum nú vóru komin inn í Havn, til eina marru.

Nú vaknaði meginparturin við kaldan dreym.

Sundalagsdreymurin, har øll skuldu hava sama møguleika, var vorðin ein marra hjá meginpartinum av tinginum.

Tey í tinginum, sum hildu »sama møguleika« vera idiotiskan, gjørdu uppskot, so sundalagsmaðurin ikki skuldi fáa atkvøðurnar hinumegin brúnna.

Síðan varð kannað, hvør kom inn, um ongin brúgv var við streymin.

Nú funnu nøkur av teimum somu, sum vildu skera av við brúna, útav, at nú komu tey ikki inn allíkavæl. Tað fekk tey at vakna, og tí gjørdu tey av, at nú skuldi brúgvin um streymin kanska aftur hava nakað at siga.

Flott. Flott! Okkara fólkavaldu.

Gerið tit bara eina skipan, sum ger, at ongin í tinginum kann skiftast út! Onki valdømi! Tað er nógv tað rættasta! Tit sita við øllum valdinum at broyta tað sjálvi! So kunnu tit sova søtan har uppi í tinginum, meðan landið fer av knóranum. Og vit onnur sleppa undan at stríða okkum í valhølini fjórða hvørt ár.

Tað verður í hvussu so er meiri rationelt enn hetta kjakið, um eg – ein einstøk atkvøða á Eiði – sleppi at velja ein tjørnuvíking, ella um eg bara sleppi at velja mannin á Oyrarbakka.



TEKNING: ÓLI P

## INNIHALD


4 REPORTASJA: HVAT BJÓÐAÐU 80' 90' 00' -INI OKKUM
6 TIPS: TURKIS
8 SAMRØÐA: ANNA NYGAARD FRÁ X-FACTOR
10 90 SEKUND: CARL JÓHAN JENSEN
12 TIL ARBEIÐIS: UMBORÐ Á SMYRLI
13 UMAFTURAFTURUMAFTUR: HØGNI DJURHUUS
14 SAMRØÐA: SÓLVIT SIMONSEN MISTI TVEIR ABBASYNIR
17 REPORTASJA: GRÝLUFEST
18 SPYRST SO LIVST: RIGMOR SVARAR
19 MÍN BESTA UPPSKRIFT: FASTALÁVINTSBOLLAR
23 TAÐ HENDUR: KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OSFR
24 VIKUMYNDIN: BESTA MYNDIN Í VIKUNI


VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Inna Törnroos
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Anna Nygaard / Rólant Waag Dam